*Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins:*

# Oljan skal gera at vit aftur kunnu fóta okkum búskaparliga

*-Vit standa í einum stórum skuldartrupulleika, og tað er greitt, at ein føroysk oljuvinna kann loysa henda trupulleika sera skjótt og munagott, soleiðis at vit við uppreistaðari pannu kunnu siga, at vit hava goldið okkara - at vit hava slætt borð sigur formaður javnaðarfloksins Jóannes Eidesgaar d*

JAN MÜLLER

-Oljan er okkara, og tað merkir, at hon er fólksins ogn. Og hetta vil siga, at ágóðin, sum ein møgulig føroysk oljuvinna kemur at kasta av sær, skal koma tí samlaða samfelagnum til góðar.

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, tingmaður og formaður javnaðarfloksins í sambandi við, at tað í hesum døgum verður tosað um at leggja seinastu hond á eina komandi oljulóggávu.

Jóannes Eidesgaard heldur, at vit eiga at fara varisliga fram og vísir til tey vandamál, sum kunnu vera í eini oljuvinnu. Her vísir hann m.a. til tey privatu áhugamálini, sum vit vita eru ómetaliga stór í slíkari vinnu.

-Vit mugu politiskt stýra gongdini soleiðis, at ágóðin kemur øllum føroyingum til góðar. Men sjálvandi kemur oljuvinnan at smitta av sær, soleiðis at eisini tað privata vinnulívið kemur at fáa nakrar ágóðar. Men hetta skal ikki vera málið í sær sjálvum.

Málið skal vera, at hetta er ein møguleiki fyri føroyska fólkið at fóta sær aftur.



*Jóannes Eidesgaard, tingmaður og formaður javnaðarfloksins: Oljan má fyrst og fremst koma tjóðini til góðar - soleiðis at vit aftur fóta okkum búskaparliga*

### Western sannførdi seg

Uppá fyrispurning hvussu hann metir útlitið fyri eini oljuvinnu í Føroyum sigur formaður javnaðarfloksins, at hann gjørdist sannførdur um henda møguleika, tá hann sum virkandi løgmaður, tá Edmund Joensen var burturstaddur, tók ímóti umboðum fyri stóru fyritøkuna Western í Tinganesi og teir løgdu føroyskum myndugleikum úrslitið av teimum seismisku kanningunum við Føroyar.

Tann mátin teir fram løgdu úrslitið uppá og tann áhugi, sum var fyri tilfarinum sannførdi meg um møguleikarnar fyri eini komandi oljuvinnu við Føroyar.

*Men hvørja ávirkan heldur tú ein slík vinna kann fáa á alt samfelagið?*

-Vit standa í dag við nøkrum stórum skuldartrupulleikum. Tað er greitt, at ein føroysk oljuvinna kann loysa tann trupulleikan sera skjótt og munagott, soleiðis at vit við uppreistaðari pannu aftana kunnu siga, at vit hava goldið okkara - at vit hava slætt borð.

### Vit eiga oljuna og vit stýra

Hvat viðvíkur gitingunum um, at tað í seinasta enda verða danir, sum fara við øllum ágóðanum frá eini møguligari oljuvinnu sigur Jóannes Eidesgaard, at tað eru vit, sum stýra útviklingini.

-Fara danir avstað við vinninginum, so er tað kleyvarsskapur frá okkara síðu.

Jóannes Eidesgaard vísir eisini aftur, at tað í teimum avtalunum, sum eru gjørdar við Danmark, er nakað, sum merkir, at vit hava avrett at møguligt yvirskot frá eini oljuvinnu.

-Vit hava sagt, at danir kunnu vera við í tann mun teir kunnu vera kappingarførir við onnur.

Formaður javnaðarfloksins heldur tað eisini vera rætt og rímuligt, at blokkurin verður minkaður, um vit finna nógv olju, soleiðis sum tað eisini er ásett í eini av avtalunum við danir.

### Oljan ger okkum meira sjálvbjargnar

-Oljan kann vera við til at gera okkum meira búskaparliga sjálvbjargnar, og tað er eisini fyrsta fortreyt fyri at tosa um nakað sum eitur sjálvstýri.

Jóannes Eidesgaard heldur sum heild, at føroyska samfelagið fer at heysta nógvar ágóðar av einum komandi oljuútviklingi her. Hann heldur somuleiðis, at vit mugu stýra hesi vinnu og undirstrikar, at her er ikki talan um eina vinnu, har tað bara eru nøkur ávís privat áhugamál, sum kunnu fara avstað við vinninginum.

-Vinningurin - provenuið - má koma landinum og fólkinum til góðar, soleiðis at vit sum tjóð aftur kunnu fóta okkkum búskaparliga.




JØRÐ-ARBEIÐI
• ÚTGREVSTUR
• SPRENGING
• KLOAKKARBEIÐI
Pf. TÓRMAGN 22161 - 22339 87361





Brúka okkum, tá tú brúkar teg!

*Sosialurin - 5 ferðir um vikuna*


## Lummatjóvar í ítróttarhallum

RANDI JACOBSEN

Kriminalpolitiið hevur eini góð ráð at geva teimum, sum venja í ítróttarhallunum: Latið vera við at hanga klæðini frá tykum við pengum í lummunum.

Hóskvøldið fekk kriminalpolitiið enn eina ferð fráboðan um, at lummatjóvar hava verið upp á spæl, hesu ferð í Ítróttarhøllini á Hálsi.

Tilsamans fleiri hundrað krónur eru hetta kvøldið horvnar úr ýmsum lummunum klæðum, sum hingu í umklæðingarrúmunum.


*tíðindablaðið*
SOSIALURIN
BOX 76 · 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið




*Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum – og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.*

- ☐ Haldarar í Føroyum: 235,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: 425,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: (5 bl. í senn): 340,-/ársfj.
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir

Til ber altíð at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum

Navn:

Bústaður:

Postnr., bygd/býur:

Tlf.: Undirskrift: